


# Statoil fær rís og rós

Jan Müller

12.02.2014 - 12:42

Oljan.fo

Ei undur í at størsta fyritøkan í Norra og entá í Norðurlondum og millum tær stóru í Europa mangan fær bæði rís og rós. Tá hon gongur á odda og ger flest nýggj olju- og gassfund í heiminum er hon ovast á breddanum í heimsins miðlum. Men tá hesin oljurisin leggur fram roknskapin ella ger av at flyta størv til triðja lond sum eitt svar uppá vaksandi kostnaðarstøðið í Norra, eru eisini atfinningar frammi í miðlunum. Norsku miðlarnir leggja ikki fingrarnar ímillum. Nú um dagarnar úttalaði ein norskur oljumilliarderur, at Helge Lund, stjóri í Statoil hevur verið ódugnaligur og eigur at leggja frá sær saman við allari nevndini. Fyritøkan fær alt ov lítið burtur úr virkseminum vóru hansara orð. Greinarar halda, at tað besta er at býta upp Statoil í tvey ymisk feløg.

Statoil hevur higartil havt sum mál at framleiða 2,5 mió. tunnur av olju um dagin í 2020, men henda ætlan tykist nú bráddliga meira veruleikafjar sambært viðmerkjarum.

Sambært íløgubankanum Morgan Stanley, so er Statoil tað felagið, sum er við í øllum liðum í oljuvinnuni, ið hevur staðið seg ringast. Og felagið rindar eisini minst út til sínar partaeigarar.

Greinarin Anne Gjøen í Handelsbanken Markets heldur, at Statoil hevur ov nógv virksemi í ov nógvum londum, har avkastið er ov vánaligt. Tað er einans í Norra og nøkrum fáum londum aftrat, at felagið hevur eitt lønandi virksemi.

“Vit mugu fáa eitt kjak um at býta upp Statoil í tvær fyritøkur. Er tað so áhugavert fyri norska statin at vera partur av eini fyritøku, har virðini minka orsakað av ov nógvum útlendskum virksemi.”